# Fíggjarmálaráðið

**Lógartænastan**

Dagfesting: 18. mai 2020
Mál nr.: 20/00081
Málsviðgjørt:
Eftirkannað: Lógartænastan dagfestir

**Uppskot til**

**Kunngerð um broyting í kunngerð um koyrikort og koyrifrálæru**
(Broytt skipan fyri koyrikort til vinnuligan fólkaflutning (bólkur DV))

**§ 1**

Í kunngerð nr. 129 frá 26. september 2018 um koyrikort og koyrifrálæru verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 16 verður aftaná stk. 2 sum nýtt stk. sett:
"*Stk. 3.* Koyrikort til vinnuligan fólkaflutning til bólk D, kann verða latið førarum, sum hava koyrikort til bólk B ella bólk D, hóast teir ikki kunnu skjalprógva, javnan í minst 1 ár í seinasta 3 ára skeiðnum, at hava koyrt stóran persónbil ella lastbil, sum báðir hava heildarvekt 5.000 kg ella meiri, eftir hesum treytum:

1) Ástøðilig frálæra.
Í minsta lagi 26 skúlatímar í ástøðiligum evnum í frálæruhøli, sbrt. § 25, stk. 6, harundir økt frálæra í hesum evnum í skjali 9 um minstakrøv til førleikar og útbúgving sum vinnuførari:
   a. 2.1. Mál: Kunnleiki til sermerktu eginleikarnar við orkuflutningi fyri at kunna fáa sum mest burtur úr orkuni.
   b. 2.3. Mál: At fáa sum mest burtur úr brennievnisnýtsluni.
   c. 2.5. Mál: At kunna taka sær av trygd og vælveru hjá ferðafólkunum.
   d. 2.6. Mál: At kunna lasta eitt akfar, samstundis sum ein lýkur trygdarkrøvini og um røttu nýtsluna av akfarinum.
   e. 3.1. Mál: Kunnleiki til samfelagsliga samanhangið og reglurnar í vegaflutningsskipanini.
   f. 3.3. Mál: Kunnleiki til reglurnar fyri flutning av ferðafólki.
   g. 4.6. Mál: At kunna laga sín atburð til ein slíkan hátt, sum stuðlar undir at hækka ímyndina av einum tænastuvirki.

2) Verklig koyrifrálæra.
Í minsta lagi 24 skúlatímar í verkligari koyrifrálæru í samsvari við frálæruætlanina fyri

koyrifrálæruna til vinnuligan fólkaflutning til bólk D, sbrt. § 25, stk. 1, nr. 4 og stk. 5.

3) Venjing á koyritekniskari breyt í Danmark.
Í minsta lagi 1 frálærudagur (7 skúlatímar) á koyritekniskari breyt í Danmark, har undirvíst verður í verkligum koyritøkni í samsvari við frálæruætlanina fyri koyrifrálæruna til bólk D. Tá skeiðið í venjing á koyritekniskari breyt er framt, skrivar lærarin eitt skeiðsprógv.

4) Førarin skal standa eina koyriroynd til vinnuligan fólkaflutning."

Stk. 3-7 verða eftir hetta stk. 4-8.

**2.** Í § 16, stk. 5, sum nú er stk. 6 verður "stk. 4, 1. pkt.," broytt til: "stk. 5, 1. pkt.,".

**3.** Í § 25, stk. 6, 2. pkt. verður "stk. 1, nr. 4 og stk. 4." broytt til: "stk. 1, nr. 4 og stk. 5.".

**4.** Aftan á § 39 verður sett:
"**§ 39 a.** Ástøðisroynd til vinnuligan fólkaflutning til bólk D, kann verða hildin, áðrenn venjing á koyritekniskari breyt, sbrt. § 16, stk. 3, nr. 3 er framd."

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Fíggjarmálaráðið, 18. mai 2020

**Jørgen Niclasen**
landsstýrismaður

/ Bjarni Askham Bjarnason